miðvikan
Nr. 249 • 30. des. 2009
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

## Sofus Gregersen:

# Bóndi og sjómaður

**Vit hava hitt 93 ára gamla Sofus Gregersen úr Syðrugøtu. Sofus er av teirri stóru Gregersenættini, sum eisini umboðar ein stóran part av Gøtu søgu. Sofus dugur eisini væl at greiða frá**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**1. partur**

Abbi Sofus í Gøtu var Ole Gregersen (1851-1929), kallaður Ólavur í Guttastovu. Hann var sonur Johanne Olesdatter (1827-1907), ættað úr Fuglafirði og Gregorius Davidsen (1825-1863) úr Syðrugøtu.

Omman var Petra Maria Husgaard (1854-1914.) Sum navnið sigur, var hon av Húsgarðættini, sum sat og situr við størsta festinum í Gøtu. Foreldur hennara vóru Anna Sofia Weihe (1822-1906) ættað úr Søldafirði og Elias (Líggjas) Petersen f. 1819 úr Syðrugøtu.

Óli og Petra fingu 11 børn. Tey flestu av teimum giftust og fingu aftur nógv børn, so í dag er eitt "ótal" av eftirkomarum eftir teimum báðum. Her kann vera nevnt, at ein onnur grein av Gregersenættini í Gøtu er frá beiggja Óla, Hans David. Gregersenættin í Klaksvík er ein triðja grein.



*Ole Gregersen eigur saman við konuni Petra eina stóra ætt*

**Børnini hjá Óla og Petru vóru:**

**1. Johan Salomon** (1876-1938), pápi Sofus. Hann giftist við Julionnu Frederikku Lervig f. 1883 úr Lorvík. Tey fingu seks børn.

**2. Anna Sofía Elisabeth** (1878-1961) giftist til Norðagøtu við Tummas Hans Hansen, hjá Jóan Petur. Tey fingu fimm børn.

**3. Gregers** (1880-1903) gekk burtur við Cyclone, sum hvarv í góðum veðri úti á Bankanum í 1903 við 16 monnum, av teimum vóru fleiri úr Gøtu. Hildið varð, at teir máttu hava verið ásigldir.

**4. Johanna Katrina** (1881-1964) giftist yvir á Skála við Petur Kristian Rasmussen. Tey fingu ikki færri enn 13 børn. 12 av teimum giftust og fingu børn. Tað er ikki ringt at rokna út, at tey "eiga" stóran part av Skála og nógv afturat.

**5. Elsa Maria** (1884-1900) gjørdist bert 15-16 ár.

**6. Anna Malena** (1885-1971) fekk Oluffu í 1907 saman við Christian Sofus Eskild Olsen úr Klaksvík Anna Malena giftist ikki og fekk tískil ikki onnur børn. Oluffa giftist við kenda skiparan Óla Hans Olsen frá Gøtugjógv. Tey fingu átta børn, sum øll eru gift og eiga børn. Her er eisini ein stór ætt.

**7. Líggjas** (1886-1886) fekk eitt heilt stutt lív

**8. Elia** (1887-1967) giftist við Dánjal Paula Poulsen av Skipanesi. Tey fingu sjey børn. Ein dóttir teirra, Petra, giftist til Gøtu og fekk eisini nógv børn.

**9. Joen Elias** (1891-1965) giftist við Sofíu Jacobinu f. Poulsen úr Syðrugøtu. Tey fingu átta børn.

**10. Magdalena** (1894-1969) giftist til Norðagøtu við Tummas Jákup Thomsen á Geilabø, ættaður úr Blásastovu í sama grannalagi. Tey fingu 13 børn.

**11. Joen Pauli** (1897-1964) giftist við Sáru Malenu Frederikku f. Simonsen úr Jørundstovu í Norðragøtu. Tey fingu fimm børn.

Tað vóru bert tvey av børnum, sum fluttu úr Gøtu. Tí er ættin í Gøtu eisini so stór.

Tað kann róliga sigast, at henda ættin hevur sett sítt fingramerki á føroyska samfelagið á nógvum økjum, og tað fer at verða komið inn á onkur teirra.



*Johan Salomon og Julianna*



*Sofus Gregersen er 93 ára gamal og dugur væl at greiða frá*

## Fyri oman Oyruna

Sofus er fyri kortum farin á Eysturoyar Ellis- og Røktarheim. Men annars hevur hann alla sína tíð búð í barndómsheiminum hjá honum og pápa hansara fyri oman Oyruna miðskeiðis í gomlu Syðrugøtu. Sofus giftist við Zelindu Jacobsen f. 1920 úr Norðragøtu. Hon var dóttir Onnu Louisu og Johan David Jacobsen, sum komið verður aftur til. Tey fingu trý børn, Julionnu, Áshild og Salomon.

**Systkin hjá Sofus vóru:**

**Óli** (1907-1916) doyði av eftirsjúku av meslingum.

**Erika** (1909-1962), sum giftist við Høgna Lómstein, ættaður úr Norðragøtu. Tey fingu 10 børn.

**Petra** (1912-2009), sum giftist við Johannes Samuelsen í Horni í Havn. Tey fingu fýra børn.

**Hanna** (1914-1993), sum giftist við Leon Joensen úr Norðragøtu. Tey fingu fimm børn.

**Óli** (1919-1970) giftist við Katrinu Thomsen úr Syðrugøtu. Tey fingu fýra børn.

**Esther** (1922-2009). Hon var ógift og búði alla sína tíð í barndómsheiminum saman við Sofusi og hansara. Hon var tó seinastu árini á Ellisheiminum í Runavík.

Tey upprunaligu húsini Fyri oman Oyruna vórðu niðurtikin í 1924, tá vóru verandi hús bygd á grunduna. Hetta gekk skjótt fyri seg. Sofus minnist, at hann kom úr skúla, og tá vóru húsini burtur. Tá fóru tey til pápabeiggjan Jóan Paula at búgva til nýggju húsini vóru klár at fara í.

Sofus minnist ikki ommuna Petru. Men hann minnist væl abban, Óla. Hann bleiv blindur 50 ára gamal. Hann var so óførur at spinna, og hetta kundi hann framvegis gera.

Upprunahúsini fyri oman Oyrunu vóru smá, sum hús vóru tá. Hoyggjhús varð bygt uppí húsið. Tað gekk bert ein kúgv inn í kjallaran. Táið ein kúgv kom afturat rendi hon seg uppundir loftið, og tá máttu gerast eitt rúm til hana í hoyggjhúsinum.

Í sethúsunum vóru serligar dyr til tey "fínu" fólkini, sum fóru beinleiðis inn í stovuna, sum var í norðara enda. Eitt kamar omanfyri stovuna var til gestir.

Anna Malena, fasturin, var ófør at veva. Hetta var bæði til húsbrúk og til dømis vevaði hon eisini kot fyri fólk. Abbin spann, og hon vevaði. Tað eru kanska ikki øll sum vita tað, men tað er øðrvísi snúður í tógnum til binding og veving.

Barndómurin hjá Sofusi hevur verið nakað tann sami, sum hjá øðrum børnum um hesa tíðina, og greiðir hann frá:

Sjógvur dró sum hjá so nógvum øðrum.